Álit

í

løgtingsmáli nr. 98/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin) (Ásetingar um kortlegging og skanning í sambandi við nettrygd og um at nágreina ásetingar um at savna upplýsingar)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 21. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Føroya Tele, Elektron og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Ásetingarnar um kortlegging eru partur av nettrygdarætlanini frá 2023. Tað hevur stóran týdning fyri arbeiðið at hækka trygdarstigið í Føroyum, at heimild er at fremja ymsu átøkini í nettrygdarætlanini, og kortlegging er ein týðandi liður í nettrygdarætlanini og hækkar trygdarstigið í Føroyum munandi.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið upplýst, at við m.a. teimum royndum, sum Fjarskiftiseftirlitið ger sær í sambandi við kortlegging, verður farið undir arbeiðið at fyrireika eina heildarlóg um nettrygd at leggja fyri Løgtingið komandi tingsetu.

Í sambandi við viðgerðina av ásetingunum um kortlegging hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið víst á, at sólseturáseting er ein møguleiki í mun til § 58 a, soleiðis at heimild er at fremja kortlegging, meðan arbeitt verður við eini heildarlóg um nettrygd.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2 verður orðað soleiðis:

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er samtykt.
Stk. 2. § 58 a fer úr gildi 31. mai 2026.

Viðmerkingar
Við broytingini verður heimildin hjá Fjarskiftiseftirlitinum til kortlegging avmarkað til bert at vera galdandi fram til 31. mai 2026.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 6. mai 2024

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	